Mars 2025

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

HEILSA

# Open Gym í venjingarmiðstøð


**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo


**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt



HEILSA

# Open Gym í venjingarmiðstøð

**Open Gym er til tín, sum er fólkapensjónistur, og vil gerast kropsliga betur fyri.**

Endamálið er at menna, halda viðlíka ella endurvinna mest møguliga rørslu og virkni og harvið stuðla undir kjarnuuppgávuni hjá Heilsu – og umsorgarnartænastuni, sum er at eggja borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.

Starvsfólk frá Terapideildini standa fyri venjingunum, so at øll kunnu føla seg trygg og koma gott í gongd við at venja. Aftaná at borgarin er upplærdur, er ætlanin at hann kann halda fram sjálvur.

Í venjingarmiðstøðini er møguleiki fyri at venja við alskyns útgerð, og tí er møguligt at leggja dent á bæði styrki og konditónsvenjing, v.m.

## Kostnaður

Kostnaðurin er 199 kr um mánaðin. Eitt stovningargjald á 99 kr. verður lagt afturat fyrsta gjaldinum. Hetta er fyri armbandið, sum gevur atgongd til at venja í venjingarmiðstøðini, tá hon er opin, umframt at læsa skápið í skiftirúminum.

Um tú vil steðga haldinum, skalt tú siga frá innan tann 15. í mánaðanum fyri. Tvs. um tú vilt steðga frá 1.desember, skalt tú siga frá áðrenn 15. november.

## Tilmelding og tíðir

Venjingin fer fram í venjingarmiðstøðini Burn, sum er gamli Handilskjarnin, Niels Finsens gøta 8.

Starvsfólk frá Terapideildini í Heilsu- og umsorganartænastuni eru í venjingarmiðstøðini:

Týsdag kl. 9.30 - 11.30
Hósdag kl. 9.30 - 11.30

Tú kann melda teg til sms-skipan okkara við at senda eitt sms við tekstinum OPENGYM til telefon 1919. Har fært tú kunning, um t.d. ein broyting verður. Tú kann melda teg frá sms-skipanini aftur, við at senda eitt sms við tekstinum OPENGYMNEI til telefon 1919

## Samband

**Heilsu- og umsorganartænastan**
Terapideildin
Telefon 30 20 00
Teldupostur heilsuhusid@torshavn.fo

